Arbeiðsfólk heimaftur

Í løtuni arbeiða umleið 2.500 útlendskir arbeiðsmenn í Íslandi. Av teimum arbeiða umleið 1.500 við at byggja eitt aluminiumsvirki á Reyðafirði, men sambært leiðsluni fáa teir uppsagnarbræv í næsta mánað, tí arbeiðið verður liðugt í hesum árinum. Á einum øðrum arbeiðsplássi eru umleið 1.000 útlendingar, men teir flestu fara av landinum í hesum árinum, skrivar Morgunblaðið. Teir 300, sum verða eftir, fara úr Íslandi næsta ár.

Dia í yrkjarahýri

Ein av luttakarunum á flokstingi Tjóðveldisfloksins, var Dia Ellentson úr Æðuvík. Hann sigur í nevndini fyri Eysturoyar Tjóðveldisfelag.

Á tinginum nýtti hann síni kreativu evnir og læt úr hondum eina stutta yrking. Hon er soljóðandi:

Bara tú riggar, tú ert mær kær,
eg leingist eftir at síggja títt bera lær,
vit eru jú eitt par,
- við ella uttan skarð!

Heidi Petersen á Flokstingi Tjóðveldisfloksins:

Frá kanning til handling

Nú er nóg mikið kannað og granskað. Nú er tíðin komin til at handla, segði Heidi Petersen á Flokstinginum vesturi í Miðvági leygardagin

FLOKSTING
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Heidi Petersen var millum teirra, sum tók orðið á flokstingi Tjóðveldisfloksins, og hon var rættiliga bersøgin í síni meining um støðu floksins.

Vit mugu út úr politisku isolatiónini. Vit mugu vísa í verki, at vit eru til reiðar at samstarva allar vegir, segði Heidi millum annað.

Heidi Petersen

Hon vísti eisini á, at til tess at kunna samstarva við allan heimin er neyðugt, at Føroyar gerast sjálvstøðug tjóð og sleppa úr danska ríkinum. Og tað er nakað, ið eigur at henda í komandi valskeiði.

Sonevnda fullveldissamgongan granskaði og kannaði og royndi at finna leistir av ymsum slag, og alt gott um tað. Men vit komu ongatíð víðari. Nú er stundin so komin til at fara frá kanning og gransking til handling. Nú má nakað henda, segði Heidi Petersen.

Tað er galdandi fyri øll øki, heilt frá javnstøðu til fullveldi. Og hetta er eisini í samsvari við tema'ið yvir flokstingi Tjóðveldisfloksins hesaferð, »Úr stongsli til samband«.

Unga Tjóðveldi gongur nýggjar leiðir:

Kvinnuligan og mannligan formann

Í unga Tjóðveldinum ganga tey høgt upp í spurningin um javnstøðu. So nógv, at tey hava tveir formenn.

Ungu tjóðveldisfólkini eru ógvuliga aktiv. Tey eru 7 fólk í nevndini, og sum nakað annars púra ókent hava tey valt at fylgja ásetingunum um javnstøðu í odd og egg. Talan er helst um einasta felag í landinum, sum hevur tveir formenn, ein kvinnuligan og ein mannligan.

Hetta er eisini nakað nýtt í Unga Tjóðveldinnum og altso fyrstu ferð, at tveir formenn eru í felagnum. Ikki tí, nevndarlimirnir ganga ikki so høgt upp í heitið, og øll í nevndini eru javnstillað. So formansheitið er meiri eitt heiti úteftir.

Felagið er annars sera aktivt og skipar fyri einum 10-12 tiltøkum um árið, umframt skeið og annað.

Fyrsta dagin verður eitt átak byrjað, sum hevur fingið heitið »Loysing krevst«. Her verður serliga hugsað um slík viðurskifti sum OL , europeisku sangkappingina og líknandi, sum altso krevur einar sjálvstøðugar Føroyar.

Barbara Holm og Rúni Nielsen eru bæði formenn í Unga Tjóðveldinum

- leo

Dávur vann ritkappingina

Tað gjørdist Dávur í Dali úr Havn, ið vann ritkappingina, sum Tjóðveldisflokkurin skipaði fyri í sambandi við flokstingið

FLOKSTING
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo



Turið Sigurdardóttir formaður í dómarabólkinum handaði Dáva kekkin uppá 10.000 kr.

12 handrit komu inn til ritkappingina, sum Tjóðveldisflokkurin skipaði fyri í sambandi við flokstingið vesturi í Miðvági um vikuskiftið.

Lætnar vóru virðisløgnir til trý tey bestu handritini. Regin Berg fekk 3, virðisløn, Tjóðhild Patursson 2., meðan Dávur í Dali vann 1. Vierðisløn fyri yrkingina »Mín dreymur um einar sjálvstøðugar Føroyar«.

Virðirløgnirnar vóru ávikavist 10.000, 5.000 og 2.000 kr.

Ein dómarabólkur við Turið Sigurdardóttir sum formanni dømdi um innkomnu handritini, og tað var Turið, ið handaði Dáva vinnarakekkin.

Mín dreymur um einar sjálvstøðugar Føroyar

I
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar fer okkum at dáma føroyska veðrið
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar fara vit at duga kvæðini
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar fáa vit sjálvsvirðing
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar fara tey ungu á háskúla
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verður helvtin av tingmonnunum kvinnur
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar koma tey samkyndu aftur
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar yngjast tey gomlu
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verður oljudansur
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða ongi ð

II
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verður veðrið gott
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar fara menninir at gera roysnisbrøgd
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verður styttri millum grindaboðini
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar fara børnini at ríða ediling
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar fara kvinnurnar at baka drýl
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða tey samkyndu lekt
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar fara vit at æra tey gomlu
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar fara vit at vaska ullina
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar fara vit at seta ð'ini rætt

III
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða jól hvønn dag
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða menninir oljusjeikar
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar fara vit at vinna í fótbólti
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða kvinnurnar supermodellir
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða børnini undurbørn
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar fáa tey samkyndu sína egnu oyggj
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða vit forever young
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar fara vit at vinna í lotto
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar fara vit at skriva enskt

IV
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða vit sjálvstøðug
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða vit sjálvstøðug
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða vit sjálvstøðug
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða vit sjálvstøðug
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða vit sjálvstøðug
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða vit sjálvstøðug
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða vit sjálvstøðug
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða vit sjálvstøðug
Tá Føroyar verða sjálvstøðugar verða vit sjálvstøðug